# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

inum! Atli hevði nógv ymisk studentaarbeiði og kom soleiðis í alskyns donsk lønmóttakaraumhvørvi, har hann í mangari dialektiskari samrøðu við sáttlig og rótfest donsk fakfelagsfólk fekk stimbrað, staðfest og konsoliderað sína javnaðar-ideologi.

Aftaná mangt studentabaks *„arvaði"* hann starvið sum redaktiónsboð á Berlingaranum frá partamanninum, Jóhan Nielsen – hetta var spennandi náttarkjansur, sum gav innlit í bæði blaðarbeiði og politiskt handverk, umframt góða løn, men tað bleiv lítil svøvnur, og vónleyst var at lesa undir slíkum umstøðum. So eftir góðum tveimum árum gavst hann á *„Afturhaldstíðindi"*, sum hann ironiskt tók til!

Tíðliga í 50-unum sá eg onkuntíð Atla, tá ið feðgarnir Dam komu inn á gólvið hjá okkum í Jónas Broncksgøtu, eitt nú, meðan bíðað var eftir ferðaskipi, sum skuldi til Danmarkar. Eg var bara hálvvaksin tá, og góð fimm ár var aldursmunurin, so *„prátið"* var rættiliga avmarkað!

Men afturfyri kom orðaskiftið okkara í lag nøkur ár seinni, og tann dialogurin hevur staðið við síðani, – meira og minni dialektiskt í næstan hálvtrýss ár, telefoniskt, brævliga ella *vis–à –vis!*

Vit komu at kennast av álvara summarið 1958. Sum fyrr nevnt, las Atli verkfrøði, og gjørdist eisini verkfrøðingur, men megináhugi hansara var avgjørt samfelagið og socialt rættvísi – eg hevði ikki áður møtt manni við so sterkari socialari indignatión – hann var ótrúliga politiskt hugaður, fylgdi sjáldsama væl við í bæði donskum og føroyskum politikki, og hevði politiska vitan sum eingin annar føroyskur útiseti.

## Rokmikil gerandisdagur

<u>Vergebens spähe ich umher</u>
<u>Ich finde deine Spur nicht mehr</u>

Hann búði í hugnaligum <u>Lejerbo</u>býli á Arnold Nielsens boulevard í Hvidovre, har Ása var lærarinna. Hann var ikki sørt errin av hesum vælskipaða og krútsterka socialdemokratiska umhvørvi og fortaldi ofta fólki, at partamenninir leingi høvdu havt reinan meiriluta á javnaðarborgini Hvidovre! Vit eru ein ovurstórur skari av fólki, sum hava sitið væl í Atlastovu og hava nógv hugnalig og stuttlig minnir frá mongum symposium í Hvidovre!

Men politikkur var næstan altíð á lofti. Serliga hugtikin var hann av teimum báðum javnaðar–politikarunum *Willy Brandt*, sum stríddist í Berlin og *Jens Otto Krag*, sum kýtti seg móti afturhaldi í Fólkatinginum. Hann kundi tosa eitt heilt kvøld um hesar socialdemokratisku undangongumenn! Ofta citeraði hann ella las úr tí idealistisku skránni *„Fremtidens Danmark"*, Krag hevði skrivað! Tað var *valabókin* hjá Atla! .

Atli var dynamiskur studentur og megnaði ófatuliga nógv í sínum turbulenta gerandisdegi. Tíðliga á morgni hópaðust hann og Hvidovre–grannin Svend Thulesen í durunum til barnastovnin, har báðir studentarnir komu við sjógv á baki og hvør síni dóttir. So drønaði hann heilt norður til Hellerups, har hann beint tá var farin at undirvísa á einum privatskúla fyrrapartin; seinnapartin fór hann til fyrilestrar á Nørrebro, og um kvøldið luttók hann dúgliga í nógvum føroyskum útisetalívi í miðbýnum, bæði í studentafelagnum og føroyingafelag. Hann sást mangan í Neystinum, sum tá lá í Nordhavn og í ítróttarfelagnum í Valby ella á Amager. Hann spældi fótbólt á Kløvermarken við føroyska liðinum. Og tá ið gamla fótbóltsidol hansara, javnaðarlæknin, Knud Lundberg spældi, var hann trúgvur áskoðari í Ítróttarparkini úti á Eystarubrúgv og helt sjálvandi við AB. Lesast mátti um náttina!.

Hann vitjaði ofta á donsku javnaðarstovuni, sum tá lá á *Rosenørns allé* – hann kendi næstan hvørt skrivstovufólk persónliga! Hann var nógv inni á Christiansborg og lurtaði eftir sínum javnaðarfyrimyndum! Hann luttók á limafundum í ymsum lokaldeildum av danska javnaðarflokkinum í øllum Keypmannahavnar amti! Á studentamatstovuni, tí viðgitna *Kannibalinum* var Atli næstan dagliga og debatteraði ótroyttiliga við sínar nationalistisku mótstøðumenn! Og loysingarmenninir sluppu heldur ikki so – um kvøldið fingu teir ofta av at vita niðri á *„Det lille Apotek,"* sum tá í tíðini var mest vitjaða kvøldstova hjá føroyskum studentum. Atli var stutt sagt legendariskt kendur sum stinnur og treystur debattørur!

## Slóðbrótari og eminentur debattørur

<u>*Oh jerum jerum jerum*</u>
<u>*Oh quae mutatio rerum*</u>

Allastaðni fekk hann idéir og inspiratión til tað politiska orðaskiftið! Altíð hevði hann við sær skriviamboð og -blokk, so hann fekk skrivað niður og arkiverað alt, sum hevði relevans. Hann akkumuleraði alsamt informatión, sum onnur ikki gáaðu eftir ella lupu um. Hann las 2-3 avísur um dagin! Harafturat tók hann sær stundir til at røkja intensivt brævasamband við P.M. Dam, Villa Sørensen og fleiri aðrar javnaðarmenn! Hann var tí fastur fúsur við posti annaðhvørt fríggjakvøld á *„Kabússuni"* í Strandgade, har fólk hittust, tá ið *Tjaldrið* fór til Føroya.

Hann var eitt sindur meira mobilur enn hinir studentarnir, – hann koyrdi knallert, meðan vit aðrir vóru á hjólrossi. Fasti attributtur hansara var tann eyðkenda bláa knallertin. Atli og bláa vóru ofta við at hokna, so fullrokað vóru tey við dýrandi fullum tægum av rúgvismiklum politiskum tilfari, – bókum, brøvum, bløðum og politiskum skjølum. Var tað so onkur, sum andøvdi móti honum, læt Atli skundisliga ta einu tægjuna upp og blaðaði ófatuliga skjótt fram á júst tað citatið ella tað argumentið, sum avgjørdi málið! Hann var fullur uppundir hendur við søguligum javnaðarargumentum!

Um heystið 1958 eydnaðist fyri fyrstu ferð javnaðarstudentum við Atla á odda at gerast størsti bólkur á einum politiskum valfundi í studentafelagnum. Hetta vísti seg at vera ein realistisk prognosa, tí stutt eftir frættu vit, at javnaðarflokkurin eisini vann sjálvt løgtingsvalið heima í Føroyum.

Eftir hetta sigursvalið, sum slóðaði fyri, at pápi hansara gjørdist løgmaður, var Atli næstan euforiskur í sínum bjartskygdu framtíðarperspektivum. Hann var sum ein hvirla og gjørdi alt fyri at informera øll útisetaumhvørvi um teir risastóru reformar, sum tann nógv umrødda 190 millióna–ætlanin skuldi føra til. Hann hevði veldugar visiónir eins og Viggo Kampmann á sinni um, at tað við danskari hjálp skuldi skapast eitt <u>*socialistiskt mynstursamfelag í Føroyum*</u>. Herviligt var tí vónbrot hansara, tá ið hitt sonevnda sjálvsstýrislandsstýrið varð skipað eftir valið í 1962, hóast javnaðarflokkurin vann valið.

Tað er einastu ferð, vit hava hoyrt ella sæð Atla verið merktan av mistreysti. Hann hevði investerað so nógva andiliga orku í røður, skriving, fundarhald og alskyns agitatión, at frustratiónin var lemjandi. Eg minnist, at hann sarkastiskt helt fyri, at kanska átti man heldur, sum tey flestu at farið og hugsa um sítt egna lítla univers og *„bara stremba eftir sjálvur at hava tað materielt gott" (citat)*! Slík materialisma og egocentriskur lívsstílur vóru annars Atla fjart, og tað var sjálvsagt heldur ikki *tað*, hann reelt vildi ella kundi.

Vit, sum hjástødd vóru, royndu eftir førimuni at kyrra hann við, at koalitiónin valla fór at gerast annað enn ein *parentes í føroyskari søgu* uppá maksimalt fýra ár, og so fór Petur Mohr Dam helst at venda styrktur aftur! Atli loftaði sær skjótt og fann politiska fótafestið aftur, og tey fylgjandi árini var hann drakoniskur og náðileysur í síni andstøðu móti tí hjálparleysa sjálvsstýrislandsstýrinum og tess útisetaverjum.

## Politiskir smokkuleggar

Polariseringin millum javnaðarflokkin og teir nationalu flokkarnar, serliga tjóðveldisflokkin var hesi árini líka so gróthørð og eirindaleys sum beint eftir krígg-ið. Tað var bládýpi millum tað sociala vælferðarsamfelagið, javnaðarmenn vildu byggja, og tað ábyrgdarleysa armóðsríkið, aðrir ætlaðu, at føroyingurin skuldi smyrja seg við

Atli gjørdist oddamaður fyri eina hvassa og konsekventa útisetaandstøðu, bæði í studentafelagnum og í føroyingafelag móti einum evnaleysum smokkuleggastýri, sum bara var tíðsspilla, tí at endamálið heilt týðuliga einans var at halda javnaðarflokkin uttanfyri ávirkan! Slíkt var eftir hansara tykki ikki politikkur – tað var at spæla við fólksins socialu lagnu.

Tiltiknar eru røður hansara frá hesum árum, eitt nú um *lívsfrælsið contra juridiskum frælsi*, um *nationalu undirlutakensluna*, um *hernaðarmálið* og ikki minst um *60–milliónа–grunnin*, sum pápi hansara og Krag høvdu fingið í lag, og sum á ironiskan hátt gjørdist lívbjarging og *kunstigur andadráttur* hjá tí fantasileysu sjálvsstýrisgonguni.

*60–milliónа–„ránið"* helt Atli beint út vera *„skammleysan politiskan stuldur"* hjá teimum nationalu! Mangur leiðandi politikari úr teimum nationalu flokkunum í Føroyum var hesi árini politiskt latin úr hvørjum plaggi, tær fáu ferðir teir hættaðu sær á fund við útisetum. Tað er vitnisfast, at teir beinleiðis *ræddust* Atla sum debattør.

Hesi árini vóru teir politisku hjálpaloysingarnir í Framanum eisini farnar at smágoyggja uppií studentatjakinum. Men teir munaðu lítið móti Atla. Teir høvdu stutt sagt for lítla søguliga barlast til at tjakast við ein rutineraðan strídsmann, sum stóð á tambi við javnaðarhugsjónum og faktuellari vitan. Tað einasta hesar novicur kundu borðreiða við var ein ótespuligur vavgreytur av sekteriskum kommunistaflosklum og nationalum orðaskvaldri, men teir vórðu skjótt so dyggiliga settir til viks, at teir komu ikki fyri seg aftur, fyrr enn Atli fór til Kuwait summarið 1968. Men tá vóru teir findargláðir, og sum ein leiðandi framamaður sjálvur tók til: *„Når katten er ude, leger musene på bordet."*

Fá ár seinni tóku hesir politisku amatørar „ræðið" í studentatjakinum, og spakuliga følnaði tað fyrr so stolta studentafelagið, okkara besta forum fyri debatt, og gjørdist ein líka so sekteriskur missiónsklubbi sum Framin; – fá ár seinni var felagið skinndeytt! Aftaná at Atli var farin til Miðeysturs varð beint fyri allari debatt – og menn skiftu tað livandi orðaskiftið út við sovjettiskar fyrisagnir, kritikkleysa avskrivt og dogmatiska fundamentalismu.

## Úr Kuwait til Tinganesar

Miðskeiðis í trýssunum starvaðist Atli hjá kendu verkfrøðisfyritøkuni *Haldor Topsøe* í Lyngby . Um tað mundið hittust hann og Sólvá, og nú varð knallertin skift út við scootara, so Sólvá fekk pláss aftan fyri á javnaðarfarinum. Tá ið ein fríløta var, drønaðu tey runt sum hvirluvindar í øllum Keypmannahavn og Jútlandi við og agiteraðu metodiskt fyri sjónarmiðum Atla. Tey búðu fyrst á Bispabergi, so á Nørrebro, men so fluttu tey aftur á Bispaberg til *Vilhelm Birkedalsvej*, beint við ta tignarligu Grundtvigskirkjuna. Har vóru ofta skemtilig symposia við stórfingnum blíðskapi! Politiska orðaskiftið var alsamt høgt prioriterað!

So politiskt engageraður var hann, at hann til løgtingsvalið í 1966 fekk sær farloyvi frá arbeiðinum, fór til Føroya og legði persónliga út í valstríðið, m.a. í Kollafirði, hóast hann sjálvsagt ikki var uppstillaður. Tað kravdi nógv áræði, og hann fekk eisini hervilig álop frá firtnum mótstøðumonnum! Javnaðarmenn, serliga á Tvøroyri vildu hava hann til Føroya beinanvegin, men Atli helt ikki, at tíðin var búgvin.

Kravið varð aftur framsett, tá ið Petur Mohr Dam doyði heystið 1968 – eisini hesu ferð sýtti Atli, tí hann ikki metti sítt vaktarskifti hóskandi júst tá. Men tá ið flokksins landsstýrismaður, Villi Sørensen doyði nýggjársdag 1970, fekk javnaðarleiðslan Atla at taka sessin sum landsstýrislim javnaðarflokksins í samferðslumálum góðan mánaða seinni.

Um hetta mundið arbeiddi Atli, sum fyrr nevnt í oljustatinum, Kuwait, framvegis fyri fyritøkuna *Topsøe*, sum hevði stórar verkfrøðisuppgávur í Miðeystri.

## Orient-syndromið

Nationalu mótstøðumenn hansara vóru febrilskir og gjørdu alt, teir vóru mentir fyri at styggja Atla burtur úr Føroyum. Teir og summir fjølmiðlar skaptu tí alskyns mytur, okkultar smettusøgur og orientalskan mystikk um *„mannin úr Kuwait"*, sum við *»dubiøsum intrigum"* royndi at troka seg framat *„úr erva"*, altso uttanum flokksorganisatiónina og vanliga javnaðarmannin *„í neðra"*. Eg veit frá fólki, sum aldri høvdu hoyrt um Atla áður, at tey av fjølmiðlum hermast fingu varhugan av, at tað snúði seg um ein suspektan, allarhelst arabiskan oljumatador í turban og oyðimarkabúna! Serliga leikaði útvarpið púra hysteriskt í um, at javnaðarflokkurin noyddist at fara heilt til Miðeysturs eftir púra „ókendum" og óroyndum manni, sum „bara" var 38 ára gamal. Tendensiøsir vóru teir tá sum nú!

Hvat rakaði tað útvarpið og hinar flokkarnar, hvønn javnaðarmenn valdu sær til framtíðarmann í flokkinum? Var tað teirra problem? At útvarp og mótstøðumenn vóru so í øðini og *„álvarsliga stúrdu"*, javnaðarflokksins vegna, er hykleriskt og ólogiskt, tí *teir* ynsktu, ið hvussu so er, *ikki* javnaðarflokkinum nakað gott! Teir mugu bæði hava verið bangnir og naivir!

Annars vóru tað júst <u>*teir meiningu og vanligu limirnir „í neðra"*</u>, serliga í Suðuroynni, sum kravdu av Atla, at hann tók við sum valevni og formaður har suðuri og sum landsstýrislimur í Tinganesi. Harumframt hevði sjálvur táverandi flokksformaðurin, Jákup Fr. Øregaard eisini heitt á Atla.

Í brævi úr Kuwait, dagfest 16. januar 1970 til Øregaards skrivar Atli næstan játtandi, men dregur á bæði – himprast og fregnast eftir, um ikki onkur annar persónur kann finnast. Hann heldur seg ikki vera nóg kendan av vanliga veljaranum í Føroyum enn, bara millum útisetar! Hann skrivar beinleiðis, at honum hevði dámt betur *at komið á meira náttúr-*

*Framhald á næstu síðu*